# ÍTRÓTTARBLAÐIÐ

Sosialurin 14. august 2009


# FSF brýtur avtalu

**Fótbóltssambandið ætlar ikki at halda avtaluna við grunnin fyri Tórsvøll, sum sigur, at allir heimadystir skulu spælast á Tórsvølli**


FÓTBÓLTUR
*Rólant Waag Dam*
*rolant@sosialurin.fo*


Brian Kerr ynskir at spæla komandi heimadystin á Svangaskarði. Hesum ynski hevur Fótbóltssambandið eftirlíkað, so Føroyar og Litava spæla á Svangaskarði tann 9. september.

Talan er tó um greitt avtalubrot við grunnin fyri Tórsvøll. Ein skrivlig avtala fyriliggur, sum sigur, at allir heimadystir hjá landsliðnum í eitt trýára skeið, skulu spælast á Tórsvølli.

Forsetin í Fótbóltssambandinum veit ikki at siga, hvussu hesin trupulleiki verður loystur. Um grunnurin fær eina fíggjarliga kompensatión fær hann heldur ikki sagt.

– Nú fara vit at práta saman soleiðis at vit fáa loyst henda trupulleika, er tað, Høgni í Stórustovu kann siga.

Hann ásannar, at tað er ógvuliga óheppið, at Fótbóltssambandið fyri aðru ferð innan fyri heilt stutta tíð, er komin í trupulleikar av gjørdum avtalum og vøllarbrúki.

Tað eydnaðist ikki at fáa eina viðmerking frá Børge B. Hansen til dagsins blað, men við Portalin í gjár segði hann, at tað var vanligt at halda gjørdar avtalur. Tí fara tey at fyrireika vøllin til dystin 9. september.



**Her ynskir Brian Kerr at spæla tann 9. september, tá Litava vitjar**

# KÍ styrkti støðuna

**Við greiðum 7-0 sigri á EB/Streymi í gjárkvøldið, legði KÍ seg aftur á odda í 1. deild hjá kvinnum, har liðið hevur sama stigatal sum AB, men nógv betri málúrtøku**


FÓTBÓLTUR
*Hilmar Jan Hansen*
*einslistir@kallnet.fo*


Sofía Purkhús gjørdist stóri málslúkurin, tá KÍ í gjárkvøldið vann 7-0 á EB/Streymi í útisettum dysti. Sofía skoraði bæði málini fyri steðgin, so hálvleiksleiðslan hjá KÍ var 2-0, og eftir steðgin skoraði hon eisini til 4-0 og 5-0. Undan tí hevði Tove Sólheyg økt um leiðsluna, og aftaná vóru tað Rannvá Andreasen og Elsa Maria Simonsen, ið staðfestu stórsigurin hjá KÍ.

Sum turru tølini siga, var stórur munur á liðunum, og sum skilst úr Klaksvík, kundi sigurin lættliga verið størri, heldur enn at EB/Streymur kundi minkað um munin. Sostatt hevur KÍ væl og virðiliga hølvað burtur úr sundalags-kvinnum, tí tá liðini hava spælt fyrr í ár, hevur KÍ vunnið bæði 5-0 og 8-0!

Sigurin merkir eisini, at nú eru KÍ-kvinnurnar aftur á odda í 1. deild hjá kvinnum. Tær hava sama stigatal sum AB-kvinnurnar, men hinvegin er málmunurin heili 26 mál betri. Tí er góður møguleiki fyri, at síðsti dysturin millum oddaliðini bæði, sum verður á Argjum í næstsíðsta umfarinum, tann 27. september, verður tann stóra finalan í bestu kvinnudeildini.

Enn eru tó fleiri dystir eftir at spæla, áðrenn komið verður so langt, og sunnudagin eru tríggir dystir á skránni. Í Gøtu spæla Víkingur og EB/Streymur, á Toftum tekur B68/NSÍ ímóti AB og Skála fær vitjan av KÍ.

**1. deild, kvinnur, støðan**

| | | D | V | J | T | Mál | Munur | Stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | KÍ | 13 | 10 | 2 | 1 | 57- 6 | +51 | 32 |
| 2 | AB | 13 | 10 | 2 | 1 | 31- 6 | +25 | 32 |
| 3 | Víkingur | 13 | 7 | 3 | 3 | 27-16 | +11 | 24 |
| 4 | Skála | 13 | 4 | 1 | 8 | 16-35 | ÷19 | 13 |
| 5 | EB/Streymur | 13 | 2 | 1 | 10 | 8-44 | ÷36 | 7 |
| 6 | B68/NSÍ | 13 | 1 | 1 | 11 | 5-37 | ÷32 | 4 |



**KÍ-kvinnurnar hava í ár havt sera gott tak á EB/Streymi, og í gjárkvøldið var einki undantak, tá KÍ vann 7-0**
**(Savnsmynd: KÍ-kvinnur Online)**